

# Oljuvirksemið í Hetlandi ongantíð verið so stórt

Deil:

Jan Müller

05.07.2014 - 10:46

Oljan.fo

**Stóru útbyggingarnar av olju- og gassvirseminum vestan fyri Hetland hava við sær virksemi sum ongantíð áður í okkara grannalandi Hetlandi.**

Franska oljufelagið Total er saman við danska DONG í ferð við at byggja út fyrstu gassframleiðsluna frá keldum vestan fyri Hetland. Henda útbygging hevur nú so mikið stórar avleiðingar á virksemið í Hetlandi, at tað í ár væntandi fara at vera 2500 fólk til arbeiðis í hesi vinnu á landi.

Tað er serstakliga bygging av eini gassverksmiðju í Sullom Voe, sum krevur nógv fólk. Franska oljufelagið hevur júst sent boð eftir 400 fólkum aftrat til at gera arbeiðið liðugt, soleiðis at har koma at arbeiða 2500 fólk restina av hesum árinum. Neyðugt er

**tí at fáa flótandi hotell aftrat til Lervick, har tað frammanundan eru fleiri av hesum slag.**

**Bara gassverksmiðjan í Hetlandi er mett at kosta 8 mia. kr. Kostnaðurin er nógv vaksin seinasta árið, úr 5 til 8 mia. kr. Haraftrat kemur so sjálv útbyggingin av Laggan Tormore gasskelduni til havs og gassleiðingin til lands.**

**Fyrsta gassið er mett at koma í framleiðslu móti ársenda, tó at tað er nakað seinkað.**